Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Talv á heimsstøði

## *Oddagrein*

HESAR seinastu dagarnar hevur Norðurlandahúsið - hetta okkara so kæra og frálíka hús - verið karmurin um eitt tað størsta talvtiltakið, ið hevur verið fyriskipað í Føroyum.

UMLEIÐ 30 telvarar hava sett hvørjum øðrum stevnu alla farnu viku. Millum teirra nakrir av heimsins bestu telvarum, her serstakliga komandi stjørnur á talvhimmalinum, unglingar, sum um ikki so mong ár fara at bjóða sjálvari heimselituni av. Tað er ikki langt við síðuna av at siga, at millum útlendsku telvararnar, sum hava víst fram síni kynstur í Norðurlandahúsinum seinastu dagarnar, finna vit ein komandi heimsmeistara. Meira um hetta inni í blaðnum.

HVÍ taka slíkt spæl sum talv fram á hesum stað? Jamen, hví ikki! Hóast talv ikki dregur eins mong til sín sum eitt nú fótbóltur, so er tað nakað serligt við hesum spæli. Nakað magiskt, nakað dragandi, nakað lívskveikjandi. At fara undir telving er eitt lívlangt projekt segði formaðurin í Talvsambandinum við útvarpið sunnukvøldið. Og hetta man helst eisini vera ein sannroyndunum - eitt av loyndarmálunum - við hesum spæli. Tú kanst byrja at telva sum heilt ungur, ja sum smádrongur og halda fram til tú er tilkomin ella komin longur upp í árini. Tú verður ongantíð liðugur at menna teg til ein enn betri telvara. Tað er avbjóðingin. Tað dragandi megin, magnetin í hesum fremstaav øllum heimsins spølum og kappingargreinum.

TAÐ er einki minni enn eitt bragd, tá okkara talvfólk megna at fáa fleiri av heimsins bestu telvarum at koma til Føroya og her geva okkara egnu telvarum íblástur. Tað krevur so sanniliga bæði hugflog, fyriskipanarevni og ikki minst dirvi og vilja at fáa heimselituna henda vegin. Nýggja teldutøknin letur eisini upp fyri ótrúligum nýggjum møguleikum. Kring allan heimin kunnu telvarar fylgja heimselituni, sum telvar í Norðurlandahúsinum. Tað skapar í sær sjálvum aftur áhuga fyri hesum fjarskotna blettinum á heimskortinum. So ikki bert fótbólturin er ambassadørur fyri føroysku tjóðina. Talvið er tað so sanniliga eisini.

VIT eru fá og smá men vit megna nógv vilja vit tað. Tað hava ikki minst okkara ítróttafólk víst á vølli. Men tað eru ikki bara úrslitini, sum telja. Tað at vera við, tað at vísa áhuga, tað at vera við til at skapa nakað, seta í gongd, fyriskipa og rætt og slætt geva lívinum eitt innihald aftrat er so sanniliga eisini at meta um eitt gott úrslit - og er aftur tann so altavgerandi og týðandi íblásturin til at vilja koma víðari. Og hann kemur nettupp við at bjóða teimum stóru av og at síggja teir bestu royna seg á heimabeiti. Hóast okkara telvarar ikki megnaðu tað heilt stóra í drúgvu kappingini, so hevur tiltakið verið ein góð upphiting til ta olympiadu, sum talvlandslið okkara nú fer til. Seinast í hesum mánaðinum fara nakrir av okkara fremstu telvarum til Turkaland at umboða føroysku tjóðina í talvolympiaduni. Vit kunnu bert ynskja teimum góða kapping. Og lat okkum eisini takka Talvsambandinum og teimum fyritøkum, sum hava viljað stuðlað, fyri eitt frálíkt tiltak.

NORÐURLANDAHÚSIÐ hevur verið karmurin um hetta stóra tiltak og hevur enn einaferð staðið sína roynd. Hetta frálíka og lívsheita hús hevur vissuliga verið føroysku tjóðini og hennara virðum kærkomið. Húsið hevur fyrst og fremst verið flaggberi fyri mentanarlig avrik, men tað er eisini í miðdeplinum, tá vinnulívsfólk fylkjast at røða um framtíðar vinnumál. Komandi vikuskiftið er fiskivinnuting í húsinum. Í næstu viku er oljuvinnuráðstevna har. Og í farnu viku vóru talvfólkini har. Føroyingar allir sum ein hava alla orsøk til at fegnast um hetta frálíka hús, sum skorar eitt 11-tal fyri og annað eftir. Og vit vilja eisini bera leiðsluni og starvsfólkunum har øll góðynski.

***Sosialurin***

# Føroya Symfoniorkestur konsert við sera fjølbroyttari skrá



Sunnudagin 22. oktober klokkan 1600. Solistur: Sámal Petersen í kendu violinkonsertini eftir Felix Mendelsohn. Á skránni annars verk eftir Richard Strauss, Chris Hazell og Lars Erik Larsson. Konertin verður í Norðurlandahúsinum. Dirigentur Martin Mouritsen.

Komandi sunnudag, tann 22. oktober hevur FSO sína árligu heystkonsert. Henda konsertin verður fjølbroyttari og við eitt sindur øðrvísi skrá enn vanligu symfonikonsertirnar. Á skránni vera fýra verk. Byrjað verður við serenatu fyri 13 blásarar av Richard Strauss. Her fáa træblásararnir í orkestrinum ein møguleika at vísa teir ljómmøguleikarar, sum liggja í „træblásaradeildini“ í einum symfoniorkestri. Verkið er fyri tvær floytur, tvær oboir, tvær klarinettir, tvær fagottir, fýra horn og kontrafagott/kontrabass. Ein sera vøkur serenata - veitslukendur tónleikur - eftir kenda týska tónasetaran Richard Strauss, 1864-1949.

Næsta verkið á skránni er víðagitna violinkonsertin eftir Felix Mendelsohn,1809 - 1847 við Sámali Petersen sum solisti. Ivaleyst vælumtókta og mest spælda verkið fyri violin og orkestur úr romantiska tíðarskeiðinum. Onkur hevur sagt um verkið, at tað er ikki skrivað fyri violin, men er sprottið úr violinini.

Eftir steðg verður eitt annað forkunnugt verk á skránni. Her fáa „messingblásararnir“ í orkestrinum at sýna annan ljómmøguleikan í einum symfoniorkestri. Hetta verkið eftir Chris Hazell hevur heitið Three Brass Cats og Another Cat, KRAKEN fyri trompetir, trombonir, althorn og tuba.

Seinasta verkið á skránni er Pastoral suita eftir svenska tónaskaldið Lars Erik Larsson. Ein tónamálningur í trimum satsum, avmyndandi vakra svenska landslagið.

Samanumtikið kann sigast, at FSO til hesa konsertina hevur sett saman eina sera áhugaverd og avbjóðandi skrá, sum vit vóna verður væl vitjað og móttikin. Komið fjølment og hugnið í Norðurlandahúsinum ein sunnudag seinnapart við vøkrum og áhugaverdum tónleiki í hugnaligum umhvørvi.



*Sámal Petersen*

## Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

**Blaðleiðslan**



# Danskt felag skal projektera nýggja Smyril

*Eftir ætlan verður arbeiðið at projektera nýggja suðuroyarskipið liðugt 14. desember og kjølurin kann strekkjast næsta heyst*



*Smyril syngur nú sín svanasong. Strandferðslan hevur gjørt av, hvar nýggi Smyril skal projekterast og arbeiðið at byggja hann byrjar næsta ár*

Áki Bertholdsen

Tað er nú greitt, at tað verður eitt danskt felag, sum fær arbeiðið at projektera tann nýggja Smyrilin hjá Strandferðsluni.

Tí nú hevur leiðslan á Strandferðsluni gjørt av at lata danska felagið, Knud E. Hansen A/S, fáa arbeiðið at at projektera tað nýggja Suðuroyarskipið.

Annars heitti Strandferðslan á fimm feløg um at bjóða uppá projekteringina av einum nýggjum Suðuroyarskipi.

Talan var um feløg í Føroyum, Noregi og í Danmark

Tilboðini komu øll innaftur, men tvey av feløgunum góvu tilboð saman.

Tilboðini lógu úr góðum 500.000 krónum, upp í 800.000 krónur.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at síðani hevur leiðslan á stovninum viðgjørt tilboðini nágreiniliga og harafturat hava fundir verið við tey áhugaverdu feløgini.

– Tá ið vit viðgjørdu tilboðini, var tað út frá ávísum fortreytum, at vit gjørdu av, hvør skuldi fáa arbeiðið, sigur Reidar Nónfjall.

–Eitt nú vórðu tey ymsu feløgini, sum bjóðaðu seg fram, mett útfrá, hvørjar royndir tey høvdu á økinum og hvønn fakligan førleika tey høvdu.

–Men vit løgdu sjálvandi eisini dent á, hvussu dýr tilboðini hjá teimum ymsu feløgunum vóru, umframt á onnur praktisk viðurskifti.

Stjórin sigur, at harafturat hevur arbeiðsbólkurin á Strandferðsluni, sum fyrireikar byggingina av nýggja Smyrli, lagt stóran dent á at tryggja eina projektering, sum er til gagns fyri Suðuroynna tey næstu 15-20 árini, og at velja eitt felag, sum best og bíligast kann ganga øllum teimum nógvu krøvum og ynskjum, sum eru, á møti.

– Í sambandi við eitt so stórt byggjarí, sum hetta, er tað somuleiðis neyðugt, at felagið, sum projekterar skipið, kann vísa á alt tað nýggjasta innan tøkni og annað í sambandi við at byggja stór ferðamannaskip.

Reidar Nónfjall sigur, at samanumtikið hevur Strandferðslan gjørt av at taka av tilboðnum frá Knud E. Hansen A/S.

– Hetta er eitt felagið, sum er sera væl fyri at loysa júst uppgávur av hesari støddini og av hesum slagnum.

– Felagið hevur eisini umleið 60 ára royndir í at projektera stór ferðamannaskip. Og harafturat var hetta felagið, sum hevði tað lægsta tilboðið.

Knud E. Hansen hevur boðið sær til at projektera nýggja Smyril fyri 525.000 krónur. Tað er 275.000 krónur bíligari enn tað dýrasta tilboðið uppá 800.000 krónur var.

Strandferðslustjórin sigur, at arbeiðið byrjar við einum „kick-off“ fundi, sum tað eitur á fakmáli.

–Har verða tær stóru linjurnar til skipið lagdar.

Hesin fundurin verður skjótast gjørligt og eftir ætlan skal arbeiðið at projektera nýggja suðuroyarskipið verða liðugt 14. desember 2000.

### Bíða eftir peningi

Reidar Nónfjall sigur, at tað, sum Strandferðslan nú bíðar eftir, er pengum at projektera nýggja Smyril fyri.

Løgtingið viðgerð í løtuni eina eina eykajáttanarlóg, har ætlanin m.a. er at játta Strandferðsluni 3,5 milliónir.

Væntandi verður hon samtykt í vikuni.

– Fyrrenn eykajáttanin er samtykt, ber ikki til at skriva undir sátmála við Knud E. Hansen um projekteringina.

– Men tað er alt, sum talar fyri, at eykajáttanin verður samtykt heilt skjótt, so at sáttmáli kann verða undirskrivaður fyrsta dagin.

Reidar Nónfjall sigur, at gongur sum ætlað, er tað væl trúligt, at kjølurin til skipið kann verða strektur næsta heyst.

– Sostatt skuldi tað borið til at sett skipið í sigling einaferð um ársskiftið 2002-2003, tí eitt skip sum hetta kann byggjast uppá tvey ár, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Hevur tú kannað rentuna?




Seinastu 12 mánaðirnar hevur íløgufelagið Altjóða Partabrøv hjá Kaupthing givið 54% í rentu og seinastu trý árini 113%. Nú kanst tú, sjálvt við fáum túsund krónum, gera íløgur í virðisbrøv. Støkk inn á gólvið hjá okkum ella einari av deildunum hjá Føroya Sparikassa og fá meiri at vita.

Rentan er roknað í tíðarskeiðunum fram til 1. september 2000. Søguligur vinningur er ikki trygd fyri framtíðar vinningi.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com